

www.oljan.fo

**Jan Müller** 08 - 05 - 2013

# Fyrsta oljan frá Johan Sverdrup í 2018

Teir starvast hjá eini fyritøku, sum metir seg hava eins stóra succes sum heimskenda Apple. Talan er um føroyingarnar Teitur Poulsen og Tummas Pauli í Mýri, ið arbeiða hjá svenska oljufelagnum Lundin, annar í Geneve og hin í Oslo. Felagið hevur skorað seg inn millum tey stóru og mest vinnandi oljufeløgini í Norðsjónum, nú tað var við til at finna eina av størstu oljukeldunum nakrantíð á norska landgrunninum, nevniliga Johan Sverdrup. Nú tykist henda successøga at gerast veruleiki, tí avmarkingar- og metingarbrunnar, sum eru boraðir á hesi risastóru oljukeldu, eru sera positivir og bera boð um, at keldan verður bygd út. Fyrsta oljan væntast koma upp longu í 2018 skrivar Lundin í sambandi við sín roknskap fyri fyrsta ársfjórðing. Sagt verður at boraðir eru 15 avmarkingarbrunnar, sum geva eina rættiliga greiða mynd av støddini. Tað er Statoil, sum verður fyristøðufelag fyri útbyggingini. Johan Sverdrup keldan fevnir um tvey leitiloyvi í Norðsjónum. Endaliga býtið av ognarrættinum til samlaðu kelduna er ikki greitt enn men fer at verða klárt seinast í 2014, tá partarnir skulu til at skipa fyri eini útbygging. Seinasta metingin hjá Lundin er, at oljukeldan goymir 1,7 til 3,3 mia. tunnur av olju, meðan norska oljudirektoratið brúkar tølini 1,26 til 2,52 mia. tunnur. Statoil eigur 40% í tí eina partinum av Johan Sverdrup oljukelduni, Lundin 40% og Maersk Oil 20%. Í hinum partinum eigur Statoil 40%, Petoro eigur 30%, Det Norske Olieselskab 20% og Lundin 10%.